# ttan



Mongu ferðirnar hjá Zascha Grabow hava ført hann til mong ymisk støð kring heimin – eisini millum vinir í Afrika



Zascha Grabow er myndamaður og hann dugir eisini av »foreviga« tær sjáldsomu myndirnar



> Hóast hann nústani er komin við í felagsskapin, er Zascha Grabow longu tann mest ferðandi týskarin og samstundis tann yngsti, sum hevur vitjað fleiri enn 400 støð

metbókina, sum tann persónurin ið hevur vitjað flest støð kring heimin. Hóast hann nústani er komin við í felagsskapin, er Zascha Grabow longu tann mest ferðandi týskarin og samstundis tann yngsti, sum hevur vitjað fleiri enn 400 støð.

- Tað er ein amerikanari - Charles A Veley - ið hevur vitjað flest støð beint nú. Men eg ætli mær í øllum førum at gera mítt til at taka hann aftur, sigur Zascha Grabow við einum brosi.

Ein part av hesi ætlan síni rakk hann í summar, tá hann vitjaði í Føroyum. Tað eru enn fleiri av kappingarneytum hansara, ið eiga hesa upplivingina til góða.

- Tey áttu øll at sæð Klaksvík. Tað er ein sera vakur býur, slær hann fast.

## Hentur tummil

Tað tók sína tíð hjá Zascha Grabow at koma allan vegin til høvuðsstað norðoyinga. Í roynd og veru byrjaði ferðin fyri jól í fjør!

- Eg fór úr heimbýi mínum fyrst í desember mánaði, og tumlaði so allan vegin gjøgnum Frakland til Spania. Har steðgaði eg so í Barcelona í nakrar dagar, inntil eg fekk fart við einum skipi sum skuldi allan vegin tvørtur um Atlantshavið til Boston, greiðir hann íðin frá.

Haðani gekk ferðin til Florida, Jamaica og onnur støð. Í mai mánaði avgjørdi hann at tumla víðari: Upp gjøgnum alt USA, fyri síðani at enda henda partin av ferðini í New York.

Her var eydnan við honum: Hann kom við í eina týska sjónvarpssending, og umvegis hesa fekk hann goldið ferðaseðilin aftur til heimland sítt og yvir aftur til Boston!

Zascha Grabow hevði tá longu bílagt sær ferðaseðil til Íslands, har hann steðgaði í nakrar dagar. Og haðani gekk so leiðin til Føroyar og Klaksvíkar.

- Eg hevði hoyrt eitt sindur um Føroyar, tá tit spældu ímóti Týsklandi í fótbólti. Og vit, sum fylgdu við dystunum, spurdu ofta okkum sjálvi: Hvar í víðu verð liggur Føroyar?!

- Eg sjálvur gjørdist eyka forvitin, og ynskti tí at fáa størri kunnleika til hetta landið, sum einans tapti við einum máli ímóti sjálvum Týsklandi!, sigur Zascha við einum brosi.

Í dag kann hann so reypa sær av, at hann hevur gjørt tað sum 142 av limunum í felagsskapinum Most Traveled People: Vitjað í vakra landi okkara.

- Kanska eg komi aftur onkutíð!

## Tríggir føroyingar á listanum

Føroyingum hava altíð dámað væl at ferðast kring allan knøttin, um tey so ikki hava annað at prógva hetta við, enn eitt stempul í einum passi.

Tað finnast tó teir føroyingarnir, sum eru við í felagsskapinum Most Traveled People. Hesir hava eisini sett sær sum mál at koma longri upp á listan, hóast enn er langt á mál.

Teir tríggir føroyingarnir eru: Sámal Bláhamar sum hevur vitjað 47 støð, Kamala Langgaard hevur sum hevur vitjað 25 støð og Kaj Egholm, ið hevur verið á 20 støðum.